# Favorittarnir vunnu

**FÓTBÓLTUR** Sum væntað vunnu Skála, TB og Undrið FF seg víðari úr undanumfarinum í kappingini um løgmanssteypið

Uni Holm Johannesen

Fótbóltsárið 2011 byrjaði loksins um vikuskiftið. Fyrstu undandystirnir í steypakappingini skuldu avgreiðast. Einki óvæntað úrslit var hesaferð.

### Skála vann stórt

Stórar broytingar hava verið í umbúna á Skála í vetur. Erland Berg Danielsen, sum spældi við NSÍ í fjør, umboðar nú aftur barndómsfelagið. Martin Olsen var á næstbesta liðnum hjá Víkingi í fjør, men hann roynir seg eisini á Skála. Tað ger toftamaðurin Niklas Poulsen eisini.

Hetta var fyrsti skrásetti dysturin hjá skálamonnum við 21 ára gamla Eliesari Olsen sum venjara. Skálamenn løgdu bragdliga fyri. Teir vunnu við fimm málum, 7-2, á Royn, sum fluttu upp í triðbestu deildina í fjør.

### Uppiborin sigur

TB spældi fyri fyrstu ferð á nýggja heimavøllinum, grasvøllinum í Hvalba. Tvøramenn eru ikki vanir við at spæla á grasi, og tað darvaði eisini spælinum í løtum, tá FF Giza vitjaði. TB vann uppiborið 2-0.

Dmitrije Jankovic, sum skifti úr B36 til TB í vetur, var fyri fyrstu ferð í verjuni hjá tvøramonnum. Martin Tausen spældi við FC Suðuroy í fjør, men stríðshugaði miðvallarin spælir nú aftur við TB.

### Eingin ivi

Undrið FF tykist hava lagt nógv fyri í vetur. Rúni Elttør, sum fyrr hevur spælt við KÍ, B36 og ÍF, er venjari. Nýggir menn í hópinum eru millum annað klaksvíkingurin Leon Bjartalíð og toftamaðurin Øssur Jacobsen.

Undrið FF vann 6-0 á MB. Heimaliðið fekk bara eitt mál fyri steðgin, men tað kom ferð á málskjótingina í seinna hálvleiki.

*uni@sosialurin.fo*

# Undrið vil spæla í Klaksvík

**FÓTBÓLTUR** Sannførandi sigurin á MB um vikuskiftið hevur við sær, at Undrið FF skal spæla móti KÍ í fyrsta umfarinum av steypakappingini

Uni Holm Johannesen

Mikkjal Hvannastein, formaður, sigur við nordlysid.fo, at felagið vil spæla í Klaksvík, hóast Undrið FF hevur heimavøll, sambært lutakastinum.

- Tað er eitt ynski frá okkara leikarum og venjarum um at sleppa at spæla dystin í Klaksvík, har karmarnir eru nógv betri við eitt nú nógv fleiri áskoðarum. Teir vænta, at tað verður nógv stuttligari at spæla ein slíkan dyst í Klaksvík, sigur Mikkjal Hvannastein við heimasíðuna.

*uni@sosialurin.fo*

# 50.000 krónur til CDT-felagið




*Niels Nattestad frá Lions Club og Frankie Jensen frá CTD-felagnum*

*Mynd: Heðin Weihe, www.hb.fo*

**FÓTBÓLTUR** CDT-felagið fekk 50.000 burtur úr stórsteypadystinum, sum EB/Streymur vann uppiborið á føroyameistarunum. Arnbjørn T. Hansen var stóra hetjan

Uni Holm Johannesen

Venjararnir, Heðin Askham og Julian Hansen, brúktu høvið at leggja seinastu hondina á fyrireikingarnar til drúgva kappingarárið, sum stendur fyri framman. Serliga framdu venjararnir nógvar broytingar í seinna hálvleiki.

EB/Streymur vann uppiborið. Leikliga vóru sundalagsmenn greitt omaná. Arnbjørn T. Hansen stóð fyri báðum málunum í dystinum.

### Lions skipar fyri

Tað eru Lions Club í Føroyum og Fótbóltssambandið, sum skipa fyri stórsteypadystinum. Í ár var avgerð tikin um, at ágóðin frá dystinum fór til CTD-felagið, sum varð sett á stovn í desember 2009.

CTD-felagið roynir at upplýsa um sjúkuna. CTD er stytting fyri Camitin Transportør Defekt. Sjúkan kann arvast frá foreldrum til børn, og Lions Club og FSF meta, at tað er týdningarmikið at upplýsa um avleiðingarnar av sjúkuni.

Hetta er fimta árið upp í slag, at steypavinnararnir og føroyameistararnir spæla um Lions-steypið. B36 vann í 2007, NSÍ í 2008, og HB vann í 2009 og 2010.

Tað verður spælt um steypið í 10 ár.

### Lagt bragdliga fyri

EB/Streymur vann Klaksvíkskappingina síðsta vikuskiftið, og sundalagsmenn vunnu stórsteypadystin í gjár. Spælarahópurin hjá Heðini Askham tykist vera tilreiðar.

Arnbjørn T. Hansen legði EB/Streym á odda, tá fyrra umfari var hálvan tíma gamalt. Fýra minuttir inn í seinna hálvleik ø kti framherjin um leiðsluna.

Sundalagsmenn vóru nógv grammari og sigurin var fult uppborin. Longu næsta vikuskiftið vitjar EB/Streymur aftur í Gundadali. Tá skal dysturin móti B36 í fyrsta umfari av steypakappingini avgreiðast. HB fær vitjan av Víkingi.

## HB – EB/Streymur 0-2 (0-1)

Dómari: Pætur Albinus

**0-1: Arnbjørn T. Hansen, 29.**
**0-2: Arnbjørn T. Hansen, 49.**

**HB:** Heðin Stenberg – Pætur T. Jørgensen, Rói Danielsen (Tórður S. Hreiðarsson, 46.), Vagnur M. Mortensen, Hendrik Rubeksen – Símun Samuelsen, Fróði Benjaminsen, Kári Nielsen (Óli Arge, 46.), Ólavur í Ólavsstovu, Jógvan Rói Davidsen – Jón Krosslá Poulsen (Andrew av Fløtum, 46. (Jógvan Andrias Nolsøe, 77.))
**EB/Streymur:** René Tórgarð – Gert Aage Hansen, Egil á Bø (Bárður Olsen, 46.), Sorin Anghel, Alex José dos Santos (Leif Niclasen, 66.) - Hans Pauli Samuelsen (Arnar Dam, 69.), Marni Djurhuus, Daniel Udsen (Poul G. Olsen, 84.), Levi Hanssen (Brian Olsen, 46.), Pætur Dam Jacobsen – Arnbjørn T. Hansen

*hagtøl: faroesoccer.com*

## Andrew skaddur

Andrew av Fløtum noyddist av vøllin í seinna hálvleikinum í gjár. Framherjin loysti av Jón Krosslá Poulsen í hvíldini. Hann varð ikki drúgvur og fór út við skaða. Sum skilst, er framvegis ikki staðfest, hvussu álvarsamur skaðin er, men tað er nógv, sum bendir á, at hann spælir ikki aftur næstu vikurnar.

## Skála – Royn 7-2 (4-1)

1-0: Jákup Johansen, 3.
2-0: Erland Berg Danielsen, brts., 17.
3-0: Jákup Johansen, 30.
4-0: Jóhannus Mikkelsen, 45.
4-1: Bjarni á Hólalagi, 45.
4-2: Jónar Holm, 59.
5-2: Edvin Jacobsen, 65.
6-2: Erland Berg Danielsen, 69.
7-2: Martin Olsen, 90.
Reytt kort: Suni Ernstsson, Skála, 45.

## TB – FF Giza 2-0 (2-0)

1-0: Rógvi Joensen, 11.
2-0: Tórur Mortensen, 23.

## Undrið FF – MB 6-0 (1-0)

1-0: Marius Nystrøm Hansen, 18.
2-0: Leon Bjartalíð, 58.
3-0: Guttormur Patursson, 75.
4-0: Esmar Æðustein Poulsen, 77.
5-0: Christian Vilhelm Jacobsen, 81.
6-0: Kristoffur Vidtfeldt, sjálvmál, 90.

Dystirnir í steypakappingini næsta vikuskiftið:

**B68 – FC Hoyvík**
**HB – Víkingur**
**Undrið FF – KÍ**
**NSÍ – B71**
**07 Vestur – FC Suðuroy**
**ÍF – Skála**
**B36 – EB/Streymur**
**AB – TB**